# Ein mikudagur í Kalsoynni

Orð: Snorri Brend
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Ein mikudag fyrr í mánaðinum var Sosialurin á vitjan í Kalsoynni. Endamálið var at útvega tilfar til hetta Oyggjablaðið.

Myndamaður okkara brúkti eisini tíðina til at fanga nakrar bygdamyndir, og verða tær vístar á hesi opnuni.





**FERÐAST**

*Børnini á Kalsoynni hava langt síðani vant seg við sjóvegis ferðasambandið. Her eru nøkur teirra ávegis til Klaksvíkar. Meðan foreldrini kunnu lesa bløð sum liggja í eini eskju, kunnu børnini keypa sær okkurt leskiligt undir tunguna. Onnur stilla fegin upp til myndatøku.*



**ÚTFERÐ**

*Starvsfólk og brúkarar frá verkhúsinum Stiggjur í Saltangará gera alt fyri at hava tað gott saman, annaðhvørt tey eru til arbeiðis ella tey fara útferð í Kalsoynna. Einfalt er at ferðast við bili til eina útoyggj sum hevur gott sjóvegis samband við meginøkið*



**SAMFERÐSLA**

*Strandfaraskipið Sam er álitið hjá kalsoyingum um teir skulu av oynni. Fleiri ferðir um dagin, bæði árla og síðla, førir hann fólk, bilar og farm um Kalsoyarfjørð*